# Posthúsið er í tí bláa bilinum

Tað er øðrvísi at vera postboð á Kalsoynni enn á stóru plássunum kring landið. Postboðið — Signhild Joensen — hevur ongan starvsfelaga, einki posthús og onga boðstovu. Alt verður avgreitt í og út frá tí lítla lastbilinum við tí eyðkenda bláa litinum. Hann er mangan fullfermdur við krovum, sum skulu av oynni til keyparar kring landið

POSTUR
*Snorri Brend*

Trøllanes: – Hey! Eg ætlaði bara at keypa talutíð til eina fartelefon!

Vit eru stødd á "posthúsinum" á Trøllanesi – ella rættari: Inni í køkinum hjá Signhild Joensen á Trøllanesi.

Hon hevur seinastu 14 árini starvast sum postboð í oynni. Hon hevur kortini einki posthús sum so, men hevur postbil og annars skrivstovu heima við hús.

Týsdagin í farnu viku var hon liðug við dagsins post, og situr hesa løtuna og prátar við gestir úr Havn.

Klokkan er nærum 13:30, tá ein kona kemur á gátt, tí hon hevur ørindi á posthúsinum á Trøllanesi.

— Jú, tað er so gamaní. Eitt talutíðarkort skalt tú fáa.

Signhild er skjót inn á skrivstovuna aftanfyri køkin. Løtu seinni er hon aftur við einum talutíðarkorti frá Føroya Tele. Og síðani fer henda konan fegin avstað aftur.

Jú, at vera postboð á bygd er eitt fjølbroytt lív. Tað mugu gestirnir úr Havn bara sanna.

### Fýra postkassar

Signhild Joensen hevur starvast sum postboð í Kalsoynni síðani 1991. Hon skuldi havt gott til at bræða í hesum sambandi, tí pápi hennara, Vilhelm Johannesen hevur havt eitt langt starv á posthúsinum í Klaksvík.

Í teim størru plássunum aðrastaðni í landinum er vanligt at postboðini møta rættiliga tíðliga á morgni fyri at skilja postin sundur til húskini á teirra rutu.

Hjá Signhild á Trøllanesi er eitt sindur øðrvísi. Hon fer fyrst frá húsum kl. 9 á morgni, tá hon leggur leiðina suður í Syðradal.

Frammanundan hava postboð í Klaksvík skilt postin soleiðis, at alt sum skal til Kalsoynna er skilt sundur frá hinum postinum.

Nú skal so tað lokaða postboðið skilja postin sundur í tær fýra bygdirnar í oynni, og síðani til tey 33 húsini, har fólk býr í.

Á Kalsoynni er tann skipanin, at hvør bygdin hevur ein av teimum eyðkendu bláu postkass-




# – Eru tey liðug at hoyggja?

At vera postboð á Kalsoynni er eitt margfalt og fjølbroytt arbeiði. Fólk vilja fegin hava postboðið at steðga á eina løtu til eitt prát um, hvat hendir aðrastaðni í oynni. – Men tíðin loyvir tíverri ikki slíkum hugnaligum práti, sigur einasta postboðið í oynni, Signhild Joensen

POSTUR
*Snorri Brend*

**Kalsoy:** At vera postboð á bygd merkir eisini tað, at ein kemur tætt inn at fólki.

Signhild virkar jú sum eitt avgreiðslupostboð, har hon fer inn til fólk at avgreiða ørindini hjá fólki.

Hetta kann t.d. vera inngjaldingar og útgjaldingar. Summi spæla Gekk ella í V4, meðan onnur hava fyri neyðini at útfylla ALS-kortini við regluligum millumbilum.

Signhild noyðist ikki at fara inn í hvørt einasta hús at avgreiða hetta slagið av ørindum.

Skipanin við spjaldrinum, sum skal heingjast uttanfyri, um fólk hava tørv á vitjan av postboðnum, er eisini galdandi í Kalsoynni. Sær postboðið spjaldrið, so fer hon á gátt, um ikki postur er til fólkini í húsinum.

### Hungra eftir tí sosiala

Nógv av tí eldra fólkinum vil fegin fáa eitt prát í lag við postboðið. Men rutan er løgd soleiðis, at stundir ikki altíð eru til tað.

Tey vilja fegin vita, hvussu tað gongst aðrastaðni í oynni: Um tey eru liðug at hoyggja í grannabygdini. Hvør mundi vera við bátinum í morgun. Hvør fór av oynni. Og um nógvar rabarbur eru tiknar upp aðrastaðni.

– Nógv av teimum hungra eftir tí sosiala. Meg má bara viðganga, at eg havi ikki møguleika til tað. Stundir eru snøgt sagt til tað, sigur Signhild.

Hon viðgongur tó, at tað ikki altíð er so lætt at fara frá aftur hesum hugnaligu fólkunum, sum dáma so væl at práta.

– Men soleiðis er tað bara, sigur hon.



*Tá Signhild ber út postin, so gongur hon gjøgnum tær hugnaligu bygdirnar á Kalsoynni*
*Mynd: Jens Kr. Vang*